## Skulu niður í løn

Skal Grikkaland sleppa burtur úr teirri sera álvarssomu búskaparkreppuni, sum landið er í, noyðast øll tey almennu starvsfólkini at góðtaka, at lønin minkar. Tey boðini fekk grikska stjórnin frá ES-nevndini í dag. Risastórt hall á fíggjarlógini og ovurstór almenn skuld hava gjørt, at Grikkaland er um at fara á húsagang, og lønarniðurskurður er sambært ES-nevndini tann einasta loysnin. Samstundis skulu ymsar vælferðartænastur skerjast. Grikkaland skyldar meiri enn 2.000 milliardir krónur og er tað fyrsta evrulandið, sum er komið í so stórar trupulleikar.



## Stundum-stundum ikki heldur fram

Higar til hava á leið 700 fólk sæð skemtileikin Stundum stundum ikki, sumk í farnu viku varð sýndur í Løkshøll í Runavík. Klaksvíkar Sjónleikarafelag, sum stendur fyri leikinum, hevur tí gjørt av, at sýningar halda fram. Sýningarnar hesa vikuni eru hvønn dag frá hóskvøldinum til sunnudagi. Tað er íslendska Saga Jónsdóttir, sum hevur leikstjórnað leikinum.

# Seta havið í fokus

**Umvegis danska formansskapin í Norðurlendska Ráðharraráðnum hava Føroyar nú fingið møguleikan at fáa limaskap í nevndum undir ráðnum, og hevur fingið formanssessin innan fiskivinnu**

FISKIVINNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, greiddi frá um føroysku møguleikarnar innan Norðurlendska Ráðharraráðið, meðan Jacob Vestergaard, fiskimálaráðharri, greiddi frá føroyska formansskapinum innan norðurlendska fiskivinnu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

- Eg haldi, at hetta hevur rættiliga stóran týdning fyri Føroyar.

Tað sigur Jacob Vestergaard, fiskimálaráðharri, sum nú situr í formansskapinum í fiskivinnunevndini í FJLS (fiskivinna, jarðbrúk, landbrúk og skógbrúk) undir Norðurlendska Ráðharraráðnum.

- Hetta er ein møguleiki, vit hava fingið, nú Danmark hevur formansskapin í Norðurlendska Ráðharraráðnum, og har er tað upplagt, at vit seta fokus átað, ið hevur við Føroyar at gera. Og vit hava valt at seta fokus á, hvussu vit best umsita okkar fiskiríkidømi, serliga við atliti til, at í 2018 falla fiskiloyvini aftur til landið, sigur Jacob Vestergaard.

Tað verður longu nú tosað um, hvussu framtíðar fiskiskipanin skal lagast og hvat skal henda eftir 2018.

- Vit eru eisini varugir við, at ES eisini er í ferð við at skipa sín fiskivinnupolitikk um frá 2012, og somuleiðis eru grannar okkara fyri vestan, íslendingar, í ferð við at umleggja sína fiskiskipan heilt av nýggjum, sigur Jacob Vestergaard.

Tað verður tí lagdur doyin á at fáa sett fokus á hetta øki, eisini við at fáa serfrøðingar inn at kjakast um framtíðar fiskiskipanina. Og í tí sambandi verður ein ráðstevna í Norðurlandahúsinum í juni, har evnið verður hvussu vit umsita okkara fiskiveiði á bestan hátt til gagns fyri samfelagið.

### Egna skrá

Hetta er ein møguleiki, sum Føroyar ikki hava havt áður, og hann er komin í lag orsakað av, at Danmark hevur formansskapin í ár.

- Vit hava fingið hendan møguleikan, og vit hava so mett um, hvat tað er, vit ynskja at leggja dent á, sigur Jacob Vestergaard.

Snikkað er til ein fullkomin skrá, har evnini eru:

- pelagiska kompleksið
- hvussu koma fiskirættindini samfelagnum til gagns
- umsiting av havvistskipanini, hvussu tulka vit burðardygga umsiting
- havið »Seas the Future«

- Eg meti sjálvur, at okkara umsiting hevur gjørt eitt gott arbeiði í hesum sambandi, og eitt serligt fokus verður sett á pelagsku fiskasløgini, sum hava sera stóran týdning, sigur Jacob Vestergaard.

Men hóast føroyingar nú hava fingið hendan møguleikan at vera limir í nevndunum hjá NR, so er hetta kortini ikki heilt nøktandi.

- Vit høvdu sjálvandi heldur verið fullgildir limir í Norðurlendska Ráðharraráðnum, men tá tað so ikki er lukkast enn, mugu vit taka við tí, ið vit fáa. Tað ræður um at verða við í so stóran mun sum til ber, sigur Jacob Vestergaard.

Hann heldur, at norðurlendska samstarvið hevur alstóran týdning.

- Og meðan vit framhaldandi stríðást fyri at fáa fullan limaskap, skulu vit taka av teimum møguleikum, vit fáa, og hetta er ein gyltur møguleiki hjá okkum at vísa, hvat vit duga. Her kunnu vit vísa, at vit kunnu verða in aktivur viðleikari í norðurlendska samstarvinum, og at gera vart við okkara sjónarmið, sigur Jacob Vestergaard, fiskimálaráðharri.

# Tað besta burtur úr tí næstbesta

**Føroyar hava framvegis ikki fingið fullan limaskap í Norðurlendska Ráðharraráðnum, og hóast føroyingar hava fingið fótin innum, verður vegurin til limaskap ikki lættari**

LIMASKAPUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Føroysku royndirnar at sleppa upp í Norðurlendska Ráðharraráðið endaði við sonevnda Álandsskjalinum, har føroyingar sleppa at verða limir í nevndunum í ráðnum.

- Hetta hava vit arbeitt við í eitt heilt ár, og tað hevur so eydnast okkum at fáa okkara sjálvstøðuga part í formansskránni. Somuleiðis hevur tað eydnast okkum at fáa drigið fleri tiltøk til Føroya, og tað er nakað, ið kann skapa virðing fyri okkum, sigur Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri.

Hetta gevur eina vitan og ein vinning, umframt at føroyingar fáa eina størri ávirkan.

- Vit hava fingið fleiri fundir til Føroya, har vit hava leiðsluna, og ein fundarleiðsla stýrir jú hvønn veg, fundurin fer. Og innan fiskivinnuøkið hava vit fingið ta embætisliguleiðsluna, sigur Jørgen Niclasen.

- Tú kanst siga, at í staðin fyri at standa uttan fyri og kasta kavabløk eftir felagsskapinum, tí hann hellir meiri og meiri eystureftir, so hava vit valt at koma inn í hitan og ávirka vestureftir, sigur uttanríkisráðharrin.

Tað er eisini komið í skjalið, at vit skulu hyggja meiri vestureftir, tað vil siga móti vesturbretlandi, Írlandi og kanadisku strondini.

Jørgen Niclasen væntar tó ikki, at hesin møguleikin fer at gera tað lættari at fáa fullan limaskap í Norðurlendska Ráðharraráðnum.

- Nei, tað vænti eg ikki. Vit hava roynt at fingið limaskap í ártíggju, men tað hevur ikki eydnast. Hetta við Álandsskjalinum er betri enn tað, sum var framman undan, men er framvegis ikki limaskapur. So tað ið vit gera, er at fáa tað besta burtur tí næstbesta, sigur Jøgen Niclasen, uttanríkisráðharri.